# Gullfossur stórsligin og ræðandi

Sjálvt um Langjøkul bert er ein brotpartur av støddini á Vatnajøkuli, so skapar smeltaða ísvatnið frá Langjøkli tann størst fossin í Íslandi. Gullfossur er bæði stórsligin og ræðandi at eygleiða. Sjálvt um fólk eru dottin útí og harvið prísgivin, so er ikki vandamikið at ganga har, um ein ansar eftir og hevur fyrilit. Tá sólin skýnur standa vakrir ælabogar yvir fossin, skaptir av sprutti og regni frá fossinum, ið skjýtur seg einar 30 metrar niður og síðani rennur víðari niður í eina 70 metrar djúpa og 2,5 kilometrar langa gjógv. Eisini um veturin kann Gullfoss verða verdur at vitja. Serstakliga um kuldi hevur ligið í longri tíð, tí her kann gerast ógvuliga kalt, og tá veksur ísur framvið og út yvir rennandi vatnið, ið ger fossin ómetaliga vakran. Hvítá er vælumtókt til riverrafting. Og hon er ikki møtimiklari enn so, enn at tey flestu kunnu vága sær ein raftingtúr á ánni.






















